# LAMANNIN!





## Viftan

Ger soleiðis:
Pakka ein vanligan pakka inn og klipp síðani ein rektangul.

1. Boygg pappírið aftur og fram á longdini, og bend tað síðani í helvt.
2. Fest við einum bandi mitt á og klistra, har tað er neyðugt fyri at halda viftuni uppá pláss.

## Skjúrtan

Ger soleiðis:
Met pappírið so, at tað er nokk rundan um allan pakkan. Tak 4 cm eyka. Lat eina av teimum smølu síðunum vera dupult so langa sum sjálvur pakkin.

1. Boygg ein 10 cm breiðan kant á tí pappírinum, sum verður lagt útyvir og boygg síðan 2 cm aftur og klistra.
2. Legg slipsbandið oman á og fest tað við at boyggja kantin tvær ferðir - umleið 3 cm í senn.
3. Klipp einar 3-4 cm inn.
4. Boygg so at tað gerst til flippu, og knýt ein vanligan slipsaknút. Klistra tað opnað á økslunum. Ger ein lítan lumma av pappíri.

## Prei

Tað skal ikki serliga nógv til at peppa vanligu pakkarnar upp. Eitt glansibílæt, sum verður límað á, nakrar perlur , eitt sindur av glimmuri ella ein lítil eykagáva undir sloyfuna gera, at pakkin verður munandi meiri vakur á at líta.



